# Íslendingar satsaðu

- Vit noyða kvinnurnar av landinum og hava einki at bjóða teimum, so tær kunnu koma heimaftur. At nýta milliónir at kanna, hvussu sandoyingar kunnu koma skjótari til SMS er einki problem, men at lata nakrar krónur at kanna, hvussu vit kunnu skapa spennandi arbeiðspláss fyri øll, er meira trupult, sigur Kári á Rógvi, formaður í Javnstøðunevndini.

Í samrøðu í seinasta Pedagogblaði, greiðir hann frá, hvussu íslendingar megnaðu at loysa trupulleikan við kvinnufráflytingini.

FÓLKATROT
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*



*Kári á Rógvi*

*" ..Tað økið, sum vit best kunnu samanbera okkum við, er Norðurlandið í Íslandi. Akureyri hevur sama fólkatal sum Havnin, og Norðurlandið á leið sama fólkatal sum er í Føroyum. Hetta er gamalt fiskivinnuøki, sum viðvíkjandi fólkasamanseting hevði tann trupulleika, at meðan fiskivinnan var eitt gott arbeiðspláss fyri menn, so var lítið og einki fyri kvinnurnar, sum ikki sóu sær annan møguleika enn at flyta burtur. Annaðhvørt til Reykjavíkar ella av landinum. Tey vildu venda gongdini og skipaðu ein lærdan háskúla, sum í fyrsta lagi var ein samanrenning av læraraskúlanum og sjúkrasystraskúlanum, og sum nú fevnir um so mangt annað. Nú verður undirvíst í løgfrøði, miðlafrøði og mongum øðrum. Við øðrum orðum ein skúli við mongum ymiskum tilboðum. Umframt at skúlin bjóðar staðbundna undirvísing, hevur hann eisini eitt stórt úrval av fjarundirvísing við lærda háskúlanum sum miðdepil. Fólk kunnu sita víðahvar í Íslandi og nema sær kunnleika og koma á skúlan av og á. Eisini kunnu lærarar frá skúlanum fara út í tey ymisku økini at undirvísa. Hetta hevur givið norðurlendingum ein heilt nýggjan møguleika, nú eisini kvinnurnar støðast í økinum og hava bæði arbeiði og útbúgvingarmøguleikar, heldur enn at flyta."*

Kári á Rógvi í Pedagogblaðnum 4/2007

--

*"Lat okkum endiliga binda landið saman og gera tunlar og annað gott, men tað hjálpir einki uppá tann álvarsliga og grundleggjandi trupulleikan, at vit missa ein stóran part av okkara besta fólki. Lat okkum heldur byrja við at økja um okkara búskap, sum Akureyri hevur gjørt. Skapið fleiri hægri útbúgvingar og harvið størri vitanarmøguleikar, so vit fáa fólk at trívast og búleikast í landinum, eitt betri kynsbýti, so fáa vit eisini ráð til tunlar. Tað má vera rætta raðfylgjan."*

Kári á Rógvi í Pedagogblaðnum 4/2007



# Universitet

**Heilaflýggjan drenar landið, og tí er gransking og útbúgving einasta loysnin á ovurstóra fólkatrotinum í Føroyum. - Eitt rættiligt universitet er einasti vegurin, vilja vit fylkjast við umheiminum inn í framtíðina, sigur Marita Rasmussen, nýsettur stjóri í Vinnuhúsinum**

FÓLKATROT
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Í mun til meginlandið eru Føroyar útjaðari, og vit hava ikki ráð til at útflyta klóku høvdini. Tí mugu og skulu vit raðfesta gransking og útbúgving allarfremst. Hetta er greiða niðurstøðan hjá Maritu Rasmussen, stjóra í Vinnuhúsinum, í samrøðu við Sosialin.

Prátið kemur í lag, sum avleiðing av ikki sørt ræðandi útlitunum fyri Føroya framtíð, sum fólk við viti og skili eru komin við seinastu dagarnar: At fólkatalið stendur í stað og at 2000 kvinnur mangla í, er ein vanlagna fyri landið. Millum teirra, sum hava úttalað seg, eru Jákup á Dul Jacobsen, vinnulívsmaður, Kári á Rógvi, formaður í Javnstøðunevndini, og Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur, her í blaðnum í dag.

## Føroyar eru útjaðari

Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum, sigur við Sosialin, at trupulleikin við fólkatroti er ein klassiskur útjaðaratrupulleiki. Í hesum sambandi er vert at leggja sær í geyma, at í mun til meginlandið eru Føroyar ein útjaðari í sjálvum sær.

- So tá ið vit tosa um útjaðarapolitikk her á landi, eiga vit ikki at gloyma, at allar Føroyar eigur at handfarast sum ein útjaðari, minnir hon á, og vísir til, at vit serliga eiga at hyggja at, hvat onnur lond í somu støðu hava gjørt, eitt nú í Norðurnorra og í útjaðaranum í ES.

## Atgongd til arbeiðsmegi

Nýsetti stjórin í Vinnuhúsinum, sum hevur tikið við eftir Jan Mortensen, greiðir frá, at tá ið búskaparvøkstur er, er týðandi at vit hava at-




*Býtið millum kvinnur og menn í ymsu aldursbólkunum* (*Kelda: Hagstova Føroya*)




*Fólkatalið stendur í stað* (*Kelda: Hagstova Føroya*)